# Starvsfólkaskipan hjá Tvøroyrar kommunu


1. Yvirskipað endamál ........ 2
2. Innan setan ........ 2
3. Setanarbólkur ........ 2
4. Setan av starvsfólkum ........ 2
Setanarpolitikkur ........ 2
5. Setanar-/starvsfólkasamrøður ........ 4
6. Farloyvi ........ 4
6.1. Uppskot til orðing í farloyvisavtalu: ........ 5
7. Sjúkrameldingar ........ 5
8. Fráfaringaraldur ........ 5
9. Merkisdagar ........ 5
10. Uppsøgn ........ 6
11. Bygnaðarbroytingar ........ 6
12. Arbeiðsumhvørvispolitikkur ........ 7
13. Útbúgvingarpolitikkur ........ 8
14. Familjupolitikkur ........ 9
15. Eldrapolitikkur ........ 10
16. Royki- og rúsdrekka/evnispolitikkur ........ 11
17. Broytingar í starvsfólkaskipanini ........ 12

## 1. Yvirskipað endamál

Endamálið við hesari starvsfólkaskipan er at tryggja eina so eins og sakliga viðgerð sum møguligt, tá starvsfólk skulu setast í starv ella sigast úr starvi hjá Tvøroyrar kommunu. Somuleiðis skal ein starvsfólkaskipan tryggja øllum starvsfólkum hjá Tvøroyrar kommunu eins møguleikar og treytir.

Starvsfólkaviðurskiftir, sum eru ásett í lóg, sáttmála og reglugerð, eru ikki endurgivin í starvsfólkaskipanini, og ansast má tí eftir, at slíkar ásetingar eisini verða fylgdar, tá talan er um at fremja tillagingar ella broytingar í starvsfólkaviðurskiftum.

## 2. Innan setan

Øll føst størv og avloysing av hesum, eiga at verða lýst leys alment. Lýsing skal greiða frá, hvussu starvið er skipað fyrisitingarliga, hvat starvið fevnir um, og hvat verður kravt av umsøkjarum. Tilskilast skal, hvagar umsøkjari skal venda sær, um viðkomandi ynskir fleiri upplýsingar um starvið.

Umsóknarfreistin skal í minsta lagi vera 14 dagar.

Størv skulu flokkast, áðrenn tey verða lýst leys. Um hetta av eini hvørjari orsøk ikki ber til at gera endaliga, áðrenn starvið verður lýst leyst, skal ein vegleiðandi flokking verða ásett.

Er talan um fyribilsstørv, bráðfeingisstørv o.l. kann verða givið frávik frá hesum reglum.

## 3. Setanarbólkur

Fíggjarnevndin, ið er starvsfólkanevndin hjá kommununi, tekur sær av lønar- og starvsfólkaviðurskiftum kommununar efitr tilmæli frá avvarandi nevndum. Allar starvssetanir skulu tilmælast av avvarandi nevnd og góðkennast av fíggjarnevndini.

Til størv, sum ikki eru leiðslustørv, kann setanarbólkurin verða myndaður av avvarandi leiðara, sum er formaður/kvinna í setanarbólkinum. Umframt leiðaran, skal setanarbólkurin fevna um minst tvey (2) onnur fólk, sum kunnu vera starvsfólk á starvsstaðnum, vanliga álitisfólkið og eitt starvsfólk afturat. Eftir tilmæli frá kommunustjóranum, skal eitt starvsfólk ella leiðslupersónur frá umsitingini luttaka í setanarbólkinum eisini.

Tá talan er um leiðarastørv verður setanarbólkurin myndaður av kommunustjóranum og tveimum umboðum, ið fíggjarnevndin velur, tó ikki politiskt.

Setanarbólkurin skal gera innstilling til avvarandi nevnd, ið síðan ger tilmæli til fíggjarnevndina, sum endaliga staðfestir og góðkennir eina setan. Setanir av leiðarum skulu umvegis fíggjarnevndina leggjast fyri býráðið, ið endaliga staðfestir og góðkennir setanina.

## 4. Setan av starvsfólkum

### Setanarpolitikkur

Tað er ein týðandi avgerð fyri bæði starvsfólk og arbeiðspláss, tá nýggj starvsfólk verða sett í starv. Tað er tí av alstórum týdningi – fyri báðar partar – at setanin verður gjørd við nærlagni og eftir ásettari mannagongd.

Endamálið er at tryggja, at Tvøroyrar kommuna setir umsøkjara, ið út frá einum heildarsjónarmiði er best egnaður til starvið. Setanarpolitikkurin skal eisini tryggja, at umsøkjarar, sum ikki fáa starv, kunnu vera vísir í, at avgerðin er farin fram á ein rættan og sakligan hátt.

**Meting og krøv**
Tá starv verður lýst leyst, skal leiðslan frammanundan gera sær greitt, hvat innihaldið í starvinum er, og hvørji krøv verða sett til tann, sum skal røkja starvið. Biðið verður um revsiváttan í lýsing eftir starvsfólki.

**Ásetingar í lógum og sáttmálum**
Ásetingar eru um starvsviðurskiftir í lógum og í sáttmálum.

Starvssetanir eru at meta sum fyrisitingarligar avgerðir, og eru tí eisini fevndar av ásetingum í fyrisitingarlógini um eitt nú svarfreist og grundgeving. Starvssetanir eru eisini fevndar av reglunum um handfaring av persónsupplýsingum í persónsupplýsingarlógini og ásetingunum í javnstøðulógini.

**Vátta fyri móttøku**
Arbeiðsplássið skal helst beinanvegin, og í seinasta lagi tveir dagar eftir at umsókn er komin, senda umsøkjaranum váttan um, at umsóknin er móttikin. Samstundis verður boðað frá, nær umsóknin verður viðgjørd.

**Viðgera umsóknirnar**
Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði av setanarbólkinum. Setanarbólkurin verður at meta um umsøkjarar, viðgera umsóknir og hava setanarsamrøður. Góð tíð skal verða sett av til at viðgera umsóknirnar.

**Svar**
Svar uppá umsókn um starv eigur at verða givið sum skjótast, tó ikki fyrrenn býráðið er kunnað um setanina. Avgerðin eigur ikki at verða almannakunngjørd, fyrr enn allir umsøkjarir hava fingið boð um avgerðina. Innanhýsis umsøkjarar, ið ikki fáa starvið, skulu hava boð frá leiðaranum, áðrenn boða verður frá, at starvið er sett.

**Grundgevingar**
Noktandi svar skulu vera skrivlig og grundgivin. Í grundgevingini skal verða kunnað um støðið undir avgerðini. T.d. hví mett er, at førleikin hjá tí, ið settur er í starvið, svarar betur til settu krøvini, enn førleikin hjá tí, ið ikki er settur – eitt nú viðvíkjandi útbúgving, starvsroyndum, persónligum eginleikum og/ella samstarvsvilja –evnum.

**Setanarbræv**
Umsøkjari, sum ætlanin er at seta í starv, skal fáa játtandi svar sum tilboð, ið viðkomandi kann taka støðu til, áðrenn endaligt setanarbræv verður skrivað. Setanarbrævið skal vera latið, áðrenn viðkomandi byrjar í starvinum. Setanarbrævið skal, umframt upplýsingar um arbeiðsgevara, løntakara og lønarviðurskifti, eisini innihalda upplýsingar um uppsagnarreglur, stytta uppsagnartíð í samband við sjúku og tagnarskyldu.

## 5. Setanar-/starvsfólkasamrøður

**Setanarsamrøður**

Setanarsamrøður eiga at verða væl fyrireikaðar og eiga at fara fram í góðum og friðaligum umhvørvi. Samrøðan kann verða skipað sum leyst prát ella eftir skrá. Umsøkjarin fær at vita hvussu long samrøðan verður, nær endaligt boð verður givið, hvussu nógv hava søkt, og hvussu nógvar samrøður verða hildnar.

**Starvsfólkasamrøður**

Starvsfólkasamrøður er ein samrøða millum starvsfólk og næsta leiðara. Í stuttum kann sigast, at tað, sum eykennir starvsfólkasamrøðurnar, er, at starvsfólk verða tikin við í ráðum um avgerðir, ið verða tiknar teirra vegna. Og at starvsfólk hervið fáa ein møgleika at ávirka sína egnu arbeiðsstøðu.
Starvsfólkasamrøður eru í trúnaði, og grunda á sínámillum álit.
Miðað verður ímóti, at hava starvsfólkasamrøður árliga.

## 6. Farloyvi

Tað er eitt krav, umfarloyvi verður játtað, at bæði starvsfólkið og leiðarin skriva undir farloyvisavtaluna.

Faloyvisavtalan skal í minsta lagi innihalda treytirnar í farloyvispolitikkinum og sum meginregla skal uppskotið til orðing av farloyvisavtalu ( sí stk. 6.1) brúkast, tí tað inniheldur allar viðkomandi treytir og upplýsingar.

Tvøroyrar kommuna er jalig, tá starvsfólk søkja um farloyvi:

- vegna persónlig viðurskifti ella serligar umstøður hjá nærmastu familju
- fyri at gera yrkisfelagsarbeiði
- fyri at taka relevanta útbúgving
- vegna luttøku í starvsbýtisskipan ella líknandi
- vegna arbeiði hjá hjálparfelagsskapum ella líknandi
- vegna manglandi arbeiði

Meginreglan er, at kravt verður 5 ára starvstíð fyri at fáa farloyvi. Farloyvi verður vanliga givið í upp í eitt ár. Í serligum førum kann farloyvi leingjast.

Verður søkt um farloyvi í samband við at farið verður í annað starv, verður farloyvi einans játtað, um skikkaður avloysari er til starvið. Hetta merkir, at avloysari má vera funnin, innan farloyvi kann játtast.
Verður farloyvi játtað, skal starvsfólkið í seinasta lagi 3 mánaðir innan farloyvistíðin er av boða frá, um viðkomandi kemur aftur í starv. Verður hetta ikki gjørt, hevur viðkomandi sjálvur sagt seg úr starvi.

Verður farloyvi játtað, kann avloysari einans setast í tíðaravmarkað starv.

Tann, ið fer í farloyvi, kann ikki fáa lovað ar koma aftur í sama starvið, men viðkomandi kann fáa lovað at koma aftur í eitt sambæriligt starv hjá kommununi.
Fíggjarnevndin avgerð, um farloyvi kann játtast.

**6.1. Uppskot til orðing í farloyvisavtalu:**
Við skrivi dagfest ??.??.20?? søkja tygum farloyvi frá starvi tygara á/í ?????, galdandi frá ??.??.20?? til ??.??.20??

Boðað verður frá, at avgerð er tikin um at játta ynskta farloyvi, vísandi til.......(t.d. starvsfólkapolitikkin á økinum, at tygum hava verið í starvi í ? ár, at avloysari er funnin til starv tygara)

Tygum skulu byrja í starvi aftur hjá kommununi tann ??.??.20??. Eingin vissa er tó fyri, at sama starvið er tøkt tá, ella at tað ikki eru hendar aðrar broytingar viðv. bygnaði, uppgávum ella líknandi, men kommunan tryggjar tygum eitt sambæriligt starv hjá kommununi, tá farloyvistíðin er lokin.

Avtalað er samstundis, at í seinasta lagi 3 mánaðir innan farloyvið endar, t.e. innan ??.??.20??, skulu tygum skrivliga boða frá, um tygum koma aftur í starv hjá kommununi ella ikki. Fær kommunan ikki fráboðanina innan freistina, eru farloyvistreytirnar ikki yvirhildnar og er støðan tá, at partarnir eru fríttstillaðir. Hetta merkir, at kommunan tá ikki longur hevur skyldu at hava starv tøkt til tygum.

Dagfesting og undirskriftir

Starvsfólkið:

__/__-20??  ______________________

Vegna kommununa:

__/__-20??  ______________________

## 7. Sjúkrameldingar
Lønardeildin skal hava avrit av øllum læknaváttanum um sjúkrameldingar.

## 8. Fráfaringaraldur
Fráfaringaraldurin fyri starvsfólk hjá Tvøroyrar kommunu er 67 ár. Undantøk kunnu vera gjørd í serligum førum.

## 9. Merkisdagar
Starvsfólk verða heiðrað soleiðis:

Starvsdagar

15 ára starvsdag blómutyssi og gávu fyri áleið 1.500,00 kr..
20 ára starvsdag blómutyssi og gávu fyri áleið 2.000,00 kr..
25 ára starvsdag blómutyssi og gávu fyri áleið 2.500,00 kr..

Eftirfylgjandi rundar starvsdagar fær starvsfólkið blómutyssi og gávur.
30 ára starvsdag fyri áleið 3.000,00 kr..
35 ára starvsdag fyri áleið 3.500,00 kr..
40 ára starvsdag fyri áleið 4.000,00 kr.. o.s.v.

Frá fyri aldur
10 -15 ár blómutyssi og gávu fyri áleið 2.000,00 kr..
15-25 ár blómutyssi og gávu fyri áleið 4.000,00 kr..
25 - ár blómutyssi og gávu fyri áleið 5.000,00 kr..

Borgarir fáa blómutyssi sendandi frá kommununi á rundum føðingardøgum frá tí, tey fylla 70 ár.

## 10. Uppsøgn

Saman við setanarmyndugleikanum fylgir uppsagnarmynduleikin. Hetta merkir, at tá fólk skulu sigast úr starvi, mugu tey sigast úr starvi av sama mynduleika, sum setti tey.

Uppsagnir av starvsfólkum verða framdar á virðiligan hátt.

Allar uppsagnir skulu fremjast sambært uppsagnarmannagongdum, freistum og fráboðanarskyldum í galdandi lógum, reglugerðum og sáttmálum.

Er talan um uppsagnir, eigur leiðslan at boða starvsfólkaumboðum og síðan starvsfólkunum frá hesum, so skjótt sum til ber. Fráboðan um ætlaða uppsøgn eigur at verða givin fyrstu dagarnar í vikuni, og helst fyrrapart á degi. Er talan um fleiri uppsagnir, eiga tær, um til ber, at verða givnar sama dag.

Leiðarin ella næsti fyrisetti biður um samrøðu við viðkomandi og boðar munnliga frá ætlaðu uppsøgnini. Skrivlig fráboðan um uppsøgnina, sum skal grundgevast, verður givin til ummælis við ásettari freist. Serligt fyrilit skal verða tikið fyri teirri ávirkan, ætlað uppsøgn ber í sær fyri viðkomandi. Tá ið starvsfólk verða søgd úr starvi, eiga tey, í tann mun, arbeiðsgevarin metir tað bera til, at fáa høvi til at fara úr starvinum beinanvegin.

## 11. Bygnaðarbroytingar

Starvsfólkaluttøka er týdningarmikil í sambandi við avgerandi broytingar á arbeiðsplássinum.

Gott samstarv millum leiðslu og starvsfólk er ein fyritreyt fyri góðum arbeiðsumhvørvi, og at tað ber til at røkka settum málum. Tað er tí av stórum týdningi, at leiðslan viðurkennir týdningin av at kunna starvsfólk um broytingar, ið kunnu ávirka arbeiðsviðurskifti teirra.

Endamálið við eini tílíkari kunning er at skapa tryggleika á arbeiðsplássinum og, til gagns fyri arbeiðsplássið alt, geva starvsfólki møguleika at verða tikin við í ráðum, tá ið broytingar verða gjørdar.

**Broytingar**
Broytingar kunnu t.d. koma í sambandi við:

- fyriskipanarligar broytingar á stovninum
- bygnaðarligar broytingar á stovninum
- broytingar av samskipanar- ella leiðsluuppgávum
- broytingar í innanhýsis arbeiðsgongdum
- økt ábyrgd av teimum uppgávum, sum higartil hava hoyrt til arbeiðið

Talan er um avgerandi broytingar, tá ið innihaldið í arbeiðinum broytist ella ávirkast grundleggjandi.

**Dømi um mannagongd**
Niðanfyri er dømi um mannagongd, ið kann verða nýtt sum fyrimynd. Mannagongdin kann tó vera ymisk alt eftir, hvørjar broytingar talan er um.

**Kunning**
Tá ið avgerð er tikin um at fremja avgerandi broytingar í umsitingini ella í arbeiðsgongdunum, skal leiðslan kunna starvsfólkini um hetta og endamálið við tí. Tó skal tíð vera til at umrøða málið, so sjónarmið og uppskot hjá starvsfólkunum kunnu verða tikin við í avgerðargrundarlagið, áðrenn avgerðin endaliga verður staðfest.

Kunnað verður á hóskandi hátt, t.d. á starvsfólkafundi, við kunningarskrivi ella í samrøðu við einstaka starvsfólkið. Samstundis eigur at verða greitt frá, nær farið verður undir sjálva broytingina, um nakað kann sigast um tað.

Í fyrsta lagi verða umboð fyri starvsfólkini kunnað, og tá ið ætlaninar eru nóg búnar, verða øll starvsfólkini kunnað.

**Seta í verk**
Umboð fyri starvsfólkini eiga at fáa høvi at luttaka í broytingararbeiðinum, í tann mun broytingin loyvir tí. T. e. vera við til at fremja broytingarnar, og verða tikin við upp á ráð, t.d. hoyrast og hava møguleika at gera tilmæli - eisini ávegis - undir skipaðum kørmum, sum eru avtalaðir frammanundan.

Allir partar eiga at vísa positivan samstarvsvilja. Men eru ósemjur, sum ikki ber til at koma ásamt um, hevur leiðslan rætt til einvegis at gera av, um broytingar skulu fremjast, eins og tað er leiðslan, ið ábyrgist fyri avgerðirnar.

## 12. Arbeiðsumhvørvispolitikkur

**Arbeiðsumhvørvi**
Arbeiðsumhvørvið, ið fevnir um kringumstøðurnar á arbeiðsplássinum- bæði likamligu og sálarligu - skal vera so trygt og heilsugott, sum til ber.

**Endamál**

Endamálið er at skapa trygd, trivnað og menning á arbeiðsplássinum og stimbra áhugan fyri arbeiðsuppgávunum, m.a. fyri at leiðsla og starvsfólk á betri og munadyggari hátt verða før fyri at røkja tær uppgávur, sum áliggja teimum.

**Fyrireikingar**
Arbeiðsviðurskiftini skulu ráðleggjast, skipast og útinnast á ein slíkan hátt, at eingin heilsuvandi er, hvørki likamliga ella sálarliga. Tá ið arbeiðshættir og amboð ella vandamikil evni verða nýtt, skal hetta altíð gerast við atliti at fyribyrging av vanlukkum og øðrum heilsuskaðum av arbeiðinum.

**Likamliga og sálarliga arbeiðsumhvørvið**
Eitt gott likamligt og sálarligt arbeiðsumhvørvi hevur m.a. hesi eyðkenni:

- Inniluft, rúm-, ljós-, ljóð-, hita- reinførisviðurskifti eru í lagi
- Javnvág millum krøv leiðslunnar, starvsfólk og tilfeingi
- Møguleikar at mennast í arbeiðinum
- Møguleikar fyri skiftandi arbeiðsuppgávum
- Ávirkan á egnu arbeiðsuppgávur
- Møguleiki, í tann mun tað ber til, at velja, hvussu uppgávur verða loystar
- Sínámillum virðing
- Samstarv við leiðslu og starvsfelagar byggir á frítt, uppbyggjandi, javnbjóðis samskifti við lítargóðari sínámillum kunning

**Trygdararbeiði**
Leiðslan, men eisini einstaka starvsfólkið, hevur ábyrgd av, at arbeiðsumhvørvið er gott.

Trygdararbeiðið skal verða skipað í tøttum tilknýti til virksemið á arbeiðsplássinum og í samstarvi millum leiðslu og starvsfólk.

Leiðslan á staðnum hevur høvuðsábyrgd av arbeiðsviðurskiftunum og av, at tær lógir, kunngerðir, reglugerðir, leiðbeiningar og avtalur, sum til eina og hvørja tíð eru galdandi, verða fylgdar.
Starvsfólk hava skyldu til at halda trygdarligu ásetingarnar, umframt at virka við til at skapa trygg og heilsugóð arbeiðsviðurskifti.
Starvsfólk skulu fáa ta kunning og leiðbeining, sum skal til fyri at kunna útinna arbeiðið á tryggan og heilsugóðan hátt.

Trygdararbeiðið skal vera skipað á arbeiðsplássum hjá Tvøroyrar kommunu eisini við trygdarumboðið sambært arbeiðsumhvørvislógini.

## 13. Útbúgvingarpolitikkur

**Útbúgvingarpolitikkur**
Starvsfólk skulu hava møguleika til at útbúgva og menna seg fyri at tryggja eitt dygdargott arbeiði.

**Endamál**
Endamálið við einum útbúgvingarpolitikki er at menna leiðslu og starvsfólk, soleiðis at tey betur eru før fyri at røkja tær uppgávur, sum eru álagdar teimum, og betur eru før fyri at átaka sær meira fjøltáttaðar arbeiðsuppgávur.

**Útbúgvingarætlan**
Skilt verður ímillum nútíðartørv og framtíðartørv á útbúgving og menning.

**Nútíðartørvur**
Serligur dentur eigur at verða lagdur á nútíðartørvin, so starvsfólk og leiðarar nema kunnleika, ið er neyðugur fyri at røkja dagliga arbeiðið.

**Framtíðartørvur**
Í samband við framtíðartørvin er tað av stórum týdnini, at gjørdar verða miðvísar útbúgvingarætlanir. Starvsfólkasamrøður er eitt amboð, sum starvsfólk og leiðsla kunnu nýta m.a. til at taka støðu til, hvussu starvsfólk eigur at menna seg, og hvat farast skal undir av til dømis eftirútbúgving.

**Eftirmeting**
Tað er av stórum týdningi, at eftirmeting verður gjørd av øllum útbúgvingum og tiltøkum yvirhøvur viðvíkjandi menning av starvsfólkum.

**Fígging**
Vavið av útbúgvingarmøguleikum er tengt at fíggjarligu orkuni hjá kommununi og tí einstaka stovninum.

## 14. Familjupolitikkur

**Familjupolitikkur**
Arbeiðið er stórur partur av gerandisdegnum hjá eini familju. Tí hevur tað stóran týdning, at arbeiði og heimalív sampakka.

**Endamál**
Endamálið er at geva einstaka starvsfólkinum rúmd fyri bæði arbeiði og heimalívi.

**Karmar og mentan**
Smidligir karmar eru neyðugir, men ikki altíð nóg mikið at røkka endamálinum um eitt familjuvinarligt arbeiðspláss. Mentanin á arbeiðsplássinum eigur at stuðla undir familjupolitikkin.

Tað liggur á leiðsluni og starvsfólkunum í felag at tryggja at so er. Her eru m.a. starvsfólkasamrøður eitt týdningarmikið amboð.

**At leggja arbeiðið til rættis**
Bæði leiðsla og starvsfólk eiga at vera lagalig og smidlig, tá arbeiðið verður lagt til rættis. Tað liggur á leiðsluni at skipa so fyri, at fleiri enn ávísa starvsfólkið duga at røkja uppgávur, ið ikki kunnu liggja óloystar vegna forfall av sjúku ella fráveru.

**At broyta arbeiðstíð**
Lívsskeiðið hjá starvsfólkum broytist gjøgnum eitt langt arbeiðslív. Arbeiðsplássið eigur at ganga grundaðum ynski um at broyta arbeiðstíðina ávíst tíðarskeið á møti.

Hetta eigur ikki at forða fyri møguleikanum fyri fakligari og persónligari menning á arbeiðsplássinum ella darva møguleikanum fyri framflyting.

**Yvirtíð**
Yvirtíð eigur at verða avmarkað. Til dømis eiga fundir ikki at verða lagdir uttan fyri vanliga arbeiðstíð, uttan so at tað er alneyðugt. Yvirtíð eigur í mest møguligan mun at verða avspákað.

**Frítíð og frídagar**
Tá frítíð og frídagar verða løgd til rættis, má atlit verða tikið at tørvinum hjá arbeiðsplássi og starvsfólki.

Leiðslan eigur saman við starvsfólkunum at leggja frítíð og frídagar lagaliga til rættis.

## 15. Eldrapolitikkur

**Eldrapolitikkur**
Tað almenna vil stuðla fýsni og eldhuga starvsfólksins og virka fyri persónligari og fakligari menning alt arbeiðslívið.

Politikkurin skal verða liðiligur, soleiðis at starvsfólk á ein skilagóðan hátt kunnu vera við til at skipa seinnu arbeiðsárini.

**Endamál**
Endamálið er at geva teimum, sum vilja tað, møguleika at gera broytingar í starvinum vegna aldur.

**Hugburður**
Eldrapolitikkurin skal vera beinleiðis partur av mentanini hjá tí almenna. Leiðsla og starvsfólk eiga at virka fyri, at hugburðurin verður lagaður til hetta mál.

**Ásetingar**
Víst verður á, at í tænastumannalógini og viðvíkjandi flestu sáttmálum eru ásetingar um eldrapolitikk og fráfaringaraldur.

**Ólíkar umstøður**
Arbeiðsuppgávur og krøv eru ymisk og arbeiðspláss ólík.
Eldrapolitikkurin skal tí lagast til hvørt einstakt arbeiðspláss.

Eldrapolitikkurin fevnir um seinasta partin av arbeiðslívinum, tað vil siga frá umleið 55 ára aldri, tá farið kann verða undir at leggja eldraárini til rættis.

**Tilevning**
Mál og karmar fyri eldrapolitikkin á staðnum eiga at verða umrødd við starvsfólkini við atliti m.a. á hesi viðurskifti:

- Vitan og royndir hjá eldri starvsfólki, sum yngri starvsfólk eiga at fáa innlit í
- At menna eldri starvsfólk
- Aldursbýti, tá til dømis arbeiðsbólkar verða settir
- Serliga krevjandi størv

Hesi mál kunnu birta undir kjak og støðutakan á einstaka arbeiðsplássinum, soleiðis at eldrapolitikkurin gerst virkin á staðnum.

**Samandráttur**
Leiðslan á staðnum eigur at gera eldraskipanir, soleiðis at eldri starvsfólk hava møguleika, í samráð við leiðsluna, at leggja arbeiðið til rættis alt eftir tørvi og ynskjum.

Leiðslan eigur at hava fyrilit fyri arbeiðstíðum og arbeiðsuppgávum hjá eldri starvsfólki, t.d. viðvíkjandi styttri arbeiðstíð og hóskandi uppgávum.

Starvsfólkasamrøður er eitt týdningarmikið høvi at tosa um eldraárini og leggja tey til rættis.

Hvørt starvsfólk hevur skyldu til at fylgja við í menningini og eigur at taka støðu til framtíðina og møguleikar á arbeiðsplássinum.

## 16. Royki- og rúsdrekka/evnispolitikkur

**Endamál**
Tvøroyrar kommuna ynskir at vera ein kommuna, ið setur heilsu og trivna hjá starvsfólkum í hásæti, sanstundis sum borgarir kunnu vera í einum tryggum og sunnum umhvørvi, tá teir eru staddir í kommunalum stovnum og bygningum.
Borgarar og aðrir við ein ørindi í teimum kommunalustovnunum og bygningum skulu ikki lukta tubbaks royk í tí almenna rúminum ella møta einum viðskiftafólkið íð luktar av alkohol ella sær út sum um at viðkomandi er ávirkaður av rúsevnum. Sum ein fylgja av hesum:

- Er tubbaksroyking ikki loyvd innandura á nøkrum av teimum kommunalu stovnunum ella í teimum bygningum sum kommunan eigur, ella umráðum sum kommunan hevur ábyrgdina av. **Tó vil tað verða loyvt búðfólki á eldrasambýlinum at roykja í felagshølunum, um borgarin er so veikur, at tað vil verða fyri ampa borgaran og/ella onnur búfolk at roykja uttan eftirlit.**

- Er tað fyri dagstovnar, skúlar, ítróttarpláss og líknandi støð, sum eru ætlað børnum, bert loyvt at roykja uttandura. Roykingin skal ikki síggjast av børnum og ungum.
- Í dagrøktarheimum er ikki loyvt at roykja í teimum rúmunum, har børnini eru, sjálvt um børnini ikki eru tilstaðar. Rum/hølir, sum er tætt við ella við síðuna av rúmunum, har børnini eru, eiga at vera roykfrí.

- Er tað ikki loyvt at verða ávirkaður av alkohol ella øðrum rúsevnum í arbeiðstíðini á kommunalum stovnum ella í bygningum sum kommunan eigur, ella økjum, sum kommunan hevur ábyrgdina av.

**Hjálp viðvíkandi rúsevnismisnýtslu**
Tvøroyrar kommuna bjóðar hjálp til starvsfólk, ið eru bundin av rúsdrekka ella øðrum rúsevnum. Støða um hjálp skal takast í hvørjum einstøkum føri.

**Kunning um royki og rúsevninspolitikk**
Øll starvsfólk í kommunalu stovnum, bygningum og økjum, sum kommunan hevur ábyrgd av, verða kunnaði munnliga og skrivliga um tann kommunala politikkin á umráðnum av tí lokalu leiðsluni

Borgarar, vitjandi og onnur við ørindum í kommununi verða kunnaði um politikkin við skeltum og ávísingum

**Eftirlit og avleiðingar av broti**
Leiðslan á tí einkulta arbeiðsplássinum skal hava eftirlit við og hevur ábyrgd av, at tann kommunali politikkurin verður hildin. Um ikki kann kommunan, sum hevur ábyrgdina av økinum, koma við átalum mótvegis leiðsluni v.m.

Endurtøka ella manglandi hald av royki- og rúsevnispolitikkinum kann viðføra, at viðkomandi verður koyrdur eftir teimum galdandi reglunum og reglunum sum eru í sáttmálanum fyri viðkomandi.

## 17. Broytingar í starvsfólkaskipanini

Broytingar og uppískoyti til starvsfólkaskipanina skulu verða viðgjørd á tveimum býráðsfundum.

*Framløgd á býráðsfundi hin 13/02 - 2017*
*og góðkend á býráðsfundi hin 13 /03 - 2017*

*Kristin Michelsen, borgarstjóri*

TVØROYRAR KOMMUNA